## Falklandsoyggjarnar

Falklandsoyggjarnar gjørdust heimskendar í 1982, tá Argentina og Bretland vóru í kríggi um valdsrættin yvir oyggjarnar, sum argentinar nevna Malvinurnar. Bretland vann tað kríggið, men enn ger Argentina krav uppá oyggjarnar. Falklandsoyggjarnar liggja 4.800 kilometrar eystanfyri argentinsku strondina. Talan er um tvær høvuðsoyggjar, Eystur-Falkland og Vestur-Falkland, harumframt eru 776 smærri oyggjar. Stanley á Eystur-Falklandi er høvuðsstaður. Falklandsoyggjarnar eru eitt sjálvstýrandi øki í tí bretska ríkinum. Nógv seyðahald hevur verið á oyggjunum, men seinastu árini hava fiskivinnan og ferðavinnan tikið dyk á seg. Oyggjaríkið er rættiliga stórt, 12.200 ferkilometrar, men einans 3.140 fólk búgva á Falklandsoyggjunum.



# Sigrun væntar ha

